# Bill Gates á fimta plássi



Hóast hann seinastu12 árinin hevur verið mettur sum ríkasti maður í heiminum, so er Bill Gates langt ífrá ríkasti maður í heimssøguni. online-magasinið, QXO.dk, hevur gjørt eitt søguligt yvirlit, har ognirnar hjá tíðarinnar størstu ríkmonnum eru reguleraðar í mun til prístalið. Og á hesum yvirlitinum er Bill Gates einans á fimta plássinum.

Greiður vinnari í samanberingini er John D. Rockefeller. Amerikanski oljukongurin, sum doyði í 1937, hevur í dagskursi eina samlaða ogn upp á $ 200 mia, og er hetta fýra ferðir so nógv sum tað, ið Bill Gates sigst at eiga.

Nummar tvey á listanum er Andrew Carnegie (1835.1919), stovnari av U.S. Steel. Trý'ari er Cornelisu Vanderbilt (1794-1877), sum fekst við flutning á jarnbreytum og dampskipum, meðan John Jacob Astor (1763-1848) er nummar fýra á listanum. Og á fimta plássinum er altso Bill Gates, men við $ 50 mia er hann tó ikki at rokna sum nakar fátækur maður.

# Oljufeløg eru heit vøra á Børsini

**Atlantic Petroleum var besta partabrævið av øllum á danska virðisbrævamarknaðinum mánadagin. Serliga tykjast stóru donsku pensiónsfeløgini áhugað í at keypa partabrævið**

VIRÐISBRØV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá hesar linjur verða lisnar, er greitt, hvørt olja varð funnin í føroysku undirgrundini á hesum sinni. Men úrslitið av hesum fer heilt víst at ávirka partabrævakursirnar hjá teimum báðum føroysku oljufeløgunum.

Hetta noyddist Atlantic Petroleum at ásanna, tá kursurin fyri tveimum vikum síðani fall nærum 30 stig, tá vit her í blaðnum bóru tíðindi um, at tað sá svart út við olju úr Brugduni á hesum sinni.

## Stórir grunnar sum íleggjarar

Men tað tykist tó á ongan hátt at hava køvt áhugan fyri føroyska partabrævinum. Seinasta mánadag varð føroyska felagið listað á danska virðisbrævamarknaðinum, og áhugin her hevur trýst kursin væl uppeftir.

Berlingarin hevði seinasta fríggjadag grein um felagið, og her varð millum annað staðfest, at stóru donsku pensiónsgrunnarnir í løtuni eru altríðir eftir sonevndum orkupartabrøvum. Og at teir í hesum sambandi høvdu stóran áhuga fyri nýggja felagnum á marknaðinum.

Vanliga vil eitt slíkt felag standa aftarliga í portefføljanum hjá somikið stórum íleggjarum. Talan er um sonevndar high-risk íløgur, men við at seta hetta sum ein lutfalsliga lítlan part av samlaðu íløguni, verður tapsvandin ikki tann heilt stóri, meðan ein stór kurshækkan hinvegin kann geva eitt gott ískoyti til samlaða avkastið av íløguspjaðingini.

## Um tað vóru tíðindini

Hvørt tað vóru pensiónsgrunnarnir, sum fóru til handils, ella um onnur lótu seg ávirka av greinunum, sum stóðu í Berlingaranum, er ilt at siga. Men undir øllum umstøðum varð handlað dúgliga við partabrøvunum í gjár. Umsett varð fyri gott og væl 6 mió kr., og hetta flutti kursin frá 596 upp á 665. Og tá kursurin var hægstur í gjár, var hann heilt uppi á 682. Eitt veldugt lop rætta vegin, sum eisini gav Atlantic heitið sum dagsins hæddarleypari á marknaðinum.

## Fleiri faktorar

Við Útvarpið segði Wilhelm Petersen, stjóri , at tað er trupult at siga, hví so nógv høvdu valt at keypa partabrøv í felagnum júst í gjár. Men hann vísti á, at greinin í Berlingske møguliga hevði sítt at siga í hesum.

Hartil varð eisini víst á, at danski marknaðurin er munandi størri, enn tann íslendski er tað. Og tað er væl hugsandi, at eitt størri potentiali í keyparaskaranum hevur havt ein øktan handil við sær.

Heldur ikki eigur at verða sæð burtur frá greiningini av partabrævinum, sum Eik Bank læt gera í vár. í hesi greining varð staðfest, at eitt realistiskt kursmál var væl oman fyri tey 800, og við hesum í huga er væl hugsandi, at partabrævið so langt ífrá hevur rakt toppin enn. Ikki minst, um olja verður funnin í føroysku undirgrundini. Men tað er so ein onnur søga.




*Atlantic beyð íleggjarum at vera vælkomnar, tá felagið varð skrásett. Og mett eftir mánadegnum hava hesir avgjørt tikið av innbjóðingini*
*Mynd: Símun J. Hansen*

**FAKTA**

Seinasta árið hevur verið framúr fyri partaeigarar í Atlantic Petroleum. Vøksturin á partabrævinum hevur í hesum tíðarskeiði verið 70,7%. Um sama mundi hevur vøksturin á ICEX-15 vísitalinum verið 41,4%. Ein vøkstur, at føroyska oljufelagið eisini eigur sín góða part, tí felagið varð fyrr í ár tikið við, tá ICEX-15 vísitalið skal roknast.

Hartil er eisini greitt, at talan er um ein positivan tendens innan sonevndu orkupartabrøvini. CSE10 Energy, sum er vísitalið fyri orkufeløg á børsinum í Keypmannahavn, er hetta seinasta árið økt 37,4%.

